

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 11 - 2011

# Statoil keypir í Norðsjónum og Barentshavinum

Statoil hevur gjørt avtalu við Total E&P Norge AS, og eftir henni yvirtekur Statoil tey 2,5 prosentini sum Total átti í Valemon-feltinum í Norðsjónum. Afturfyri fær Total 2,0 prosent av Hild-feltinum frá Statoil. Valemon-feltið er undir útbygging og fer eftir ætlanini undir framleiðslu seint í 2014. Framleiðslan er mett til 68.000 tunnur um dagin. Við býtishandlinum eigur Statoil nú 66,775 prosent av Valemon. Hini feløgini eru Petoro við 30 prosentum og Enterprise Oil Norge við 3,225 prosentum. Statoil brynjar seg eisini út í Barentshavinum, har felagið hevur yvirtikið tey 3,26 prosentini, sum Hess átti í fleiri framleiðsluloyvum í Snøhvit. Við avtaluni eigur Statoil 36,79 prosent av Snøhvit. Hini feløgini eru Petoro við 30 prosentum, Total E&P Norge við 18,4 prosentum, GDF SUEZ E&P Norge við 12 prosentum og RWE Dea Norge við 2,81 prosentum. Øystein Michelsen, menningar- og framleiðslustjóri hjá Statoil í Noregi, sigur, at avtalan um ein størri part av Snøhvit er týðandi, tí Snøhvit fer at hava stóran týdning fyri felagið í mong ár frameftir. Hann vísir á, at Snøhvit er stórt, og at tað verður virðisskapandi í minst 30 ella 40 ár fram í tíðina. Snøhvit varð funnið í 1981, og framleiðslan byrjaði á sumri í 2007.